HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Tórshavnar kommuna
Postrúm 32
FO-110 Tórshavn

Tórshavn, hin 11. juni 2002
Málnr.: 612-200200035-3
Tykkara málnr.:
Málsviðgeri: HE / 35 64 25

# UMHVØRVISGÓÐKENNING AV TEKNISKUM DEILDARHÚSI HJÁ TÓRSHAVNAR KOMMUNU


1 Umsóknin 2
1.1 Av viðkomandi tekningum eru: 2
1.2 Av øðrum viðkomandi upplýsingum eru: 2

2 Lýsing av virkinum 3

3 Lýsing av umhvørvisviðurskiftum 3

4 Málsviðgerð 3

5 Góðkenningartreytir 4
5.1 Innrætting og rakstur 4
5.2 Luft, luktur og ljós. 4
5.3 Óljóð og ristingar 4
5.4 Spillvatn 5
5.5 Kemikaliugoymsla 5
5.6 Burturkast 5
5.7 Óhapp 6
5.8 Innaneftirlit 6
5.9 Rakstrarskráseting 6

6 Alment 6

7 Kæruvegleiðing 7



Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. **+298 356 400**
Fax. **+298 356 401**
E-mail: feagency@hfs.fo
Homepage: http:\\www.hfs.fo

**UMHVØRVISGÓÐKENNING**
**AV TEKNISKUM DEILDARHÚSI**
**HJÁ TÓRSHAVNAR KOMMUNU**

Við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 um umhvørvisvernd frá 29. oktober 1988 og grein 1, stk. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994, um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Heilsufrøðiligu starvsstovuna, verður við hesum sagt frá, at Heilsufrøðiliga starvsstovan kann veita umhvørvisgóðkenning til Tekniska deildarhúsið hjá Tórshavnar kommunu (Sløkkiliðsstøðin og verkstaðurin) við Oyggjarvegin.

Umhvørvisgóðkenningin verður givin við teimum treytum, sum eru lýstar í partinum um "Góðkenningartreytir" niðanfyri, og upplýsingum, ið eru móttiknar saman við umsóknini.

## 1. Umsóknin

Heilsufrøðiliga starvsstovan fekk tann 18. januar 2002 umsókn um umhvørvisgóðkenning frá Teknisku deild Tórshavnar kommunu.

Saman við umsóknini eru móttiknar tekniskar upplýsingar um virksemið og útleiðingar, umframt kort, sum sýna staðsetingina og innrættingina av deildarhúsinum.

### 1.1 Av viðkomandi tekningum eru:

- Kort við matrikulering yvir øki (Akt 1).
- Innrætting av plássi - støðumynd (Akt 1, Tekn.: N1).
- Flatmynd av niðaru hædd (Akt 1, Tekn.: V1).
- Flatmynd av ovaru hædd (Akt 1, Tekn.: V2).
- Støðumynd kloakk (Akt 1, Tekn.: 300, Rættaður kloakkplanur 13.09.01).
- Kloakkplanur (Akt 1, Tekn.: 301 A).
- Síðumyndir (Akt 1, Tekn. 103).
- Tvørskurður (Akt 1, Tekn.: 104).

### 1.2 Av øðrum viðkomandi upplýsingum eru:

- Byggisamtykt fyri økið ( Akt 1).
- Databløð fyri:
  - Besma Extra
  - Kemilux S1 Extra
  - Apollo Syntetisk skúmveska F-5
  - PERS KEMI SIGGI penselbejse
  - DiverseyLever Suma Grovrengøring
  - DiverseyLever Lensitil Top.

## 2. Lýsing av virkinum

Virkið verður staðsett á matr. nr. 1232 og 1230b í Tórshavn.

Virksemið, ið er knýtt at deildarhúsinum, er:
- **Bjargingar- og sløkkliðsstøð.**
- Goymsla og viðlíkahald av sløkkiliðsútgerð.
- Reingerð av sløkkiliðsútgerð í sambandi við sløkkiliðsvirksemi.
- Skeiðsvirksemi, herundir smáar uttandura venjingar í eldsløkking.
- **Verkstaður.**
- Umvæling av maskinum og amboðum hjá Tórshavnar kommunu.
- Vanligt smiðjuarbeiði.
- Vasking av bilum og amboðum hjá Tórshavnar kommunu uttandura.
- Klárgering av lastbilum at taka ímóti asfalti uttandura.
- **Goymsla av ferðsluskeltum.**
- **Pláss til áfylling av dieseloju á bilarnar hjá Tórshavnar kommunu.**

## 3. Lýsing av umhvørvisviðurskiftum

Virksemið í sambandi við deildarhúsið kemur at hava við sær útleiðing til luftina, frá útsúgving av sveisiroyki frá verkstaði og útsúgving av útstoytsgassi frá bilum. Harumframt kann nakað av pulvuri koma frá rúmi til áfylling av pulvureldsløkjarum og frá uttandura venjing í eldsløkking. Í sambandi við venjingar í eldsløkking uttandura kemur eisini nakað av royki frá brennandi bensini og dieselolju.

Í sambandi við venjingar í eldløkking, vask av bilum, maskinlutum og klárgerð av asfaltbilum kann verða nakað av útleiðing av olju og oljuemulsjón. Soleiðis verður vatnið frá økjum, har vandi er fyri oljudálking, leitt til kommunalu spillvatnsleiðingina umvegis oljuútskiljara við sandfangi.

## 4. Málsviðgerð

Grundarlagið undir málsviðgerðini er fyrst og fremst tær upplýsingar, sum eru móttiknar í omanfyri lýsta tilfari.

Harafturat er niðanfyri nevnda tilfar nýtt í viðgerðini:
- Vejledning fra Miljøstyrelsen: Autoværksteder og miljøkrav, Miljøstyrelsen 1996.
- Bekendtgørelse om miljøkrav i forbindelse med etablering og drift af autoværksteder m.v., Miljø- og Energiministeriet, 1997.
- Vejledning fra Miljøstyrelsen: Begrænsning af luftforurening fra virksomheder, der udsender svejserøg, Miljøstyrelsen Nr. 13 1997.

Undir viðgerðini er serligur dentur lagdur á hesi viðurskifti:
- At útleiðingin av royki og spillvatni verða hildin innanfyri mørk, sum eru mett at vera umhvørvisliga trygg.

# 5. Góðkenningartreytir

Umhvørvisgóðkenningin er treytað av fylgjandi ásetingum:

## 5.1 Innrætting og rakstur

5.1.1 Økið, ið hoyrir til virkið, skal vera týðiliga merkt og haldast ruddiligt og reint.
5.1.2 Eitt eintak av hesi góðkenning skal altíð vera tøkt á virkinum (deildarhúsinum).
5.1.3 Starvsfólkið skal vera kunnug við innihaldið í hesi góðkenningini.
5.1.4 Øll øki, ið hoyra til virkið, har ið møguleiki er fyri, at kemisk evni so sum olja kunnu leka, skulu vera úr tøttum tilfari.
5.1.5 Virkið hevur skyldu til altíð at nýta bestu tøku tøknina (BAT[1]) fyri at minka mest møguligt um øll útlát, og skal tøka reinsiútgerðin altíð nýtast til fulnar. Virkið skal halda øll útlát so lág sum gjørligt fyri at avmarka dálkingina mest møguligt. Tey kemikaliu, ið nýtt verða, skulu hava minst møguligt árin á umhvørvið.
5.1.6 Undir arbeiði, har vandi er fyri spilli av evnafrøðiligum evnum, skal arbeiðast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.

## 5.2 Luft, luktur og ljós.

5.2.1 Virksemið má ikki verða atvoldin til royk-, lukt- ella dustampar uttanfyri økið hjá virkinum.
5.2.2 Innan 1. juni 2003 skal útleiðingin frá útlufting av sveisiroyki, útstoytsgassi og frá rúmi, har ið pulvur verður fylt á eldsløkjarar, vera minst 1 m yvir tak.
5.2.3 Um Heilsufrøðiliga starvsstovan ynskir tað, skulu sýni takast av útleiðingarluftini, um neyðugt verður at meta um útlátini.
5.2.4 Øll útleiðing til luftina skal vera uppeftirrættað.
5.2.5 Útleiðingarluftin má í mesta lagi innihalda 20 mg av dusti pr. $Nm^3$.
5.2.6 Um ampar verða av dusti, lukti ella øðrum, skulu neyðug tiltøk setast í verk.
5.2.7 Nýtsla av ljósum á virkinum skal verða soleiðis, at hetta ikki hevur við sær ampa.

## 5.3 Óljóð og ristingar

5.3.1 Raksturin á staðnum má ikki hava við sær, at óljóðstøðið, ásett sum tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðstøðið í dB(A) frá virkinum, fer upp um niðanfyri standandi mørk máld við næsta grannamark, á nevndu økjum og tíðarskeiðunum:

| Dagur | Tíð | Øki 1 | Øki 2 | Øki 3 | Øki 4 |
|---|---|---|---|---|---|
| Mán. - frí. | 07.00 - 18.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Leygar. | 07.00 - 14.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Mán - frí. | 18.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Leygar. | 14.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Halgi. | 07.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allir dagar | 22.00 - 07.00 | 70 | 60 | 40 | 35 |

[1] Best Available Technology.

Øki 1: Vinnuøki og havnarøki, har meira larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 2: Vinnuøki og havnarøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarrøki.
Øki 4: Bústaðarøki.

Tað mestloyvda óljóðstøðið frá virkinum mált innandura í tíðarskeiðnum kl. 22-07 kann í mesta lagi fara 15 dB(A) upp um tey nevndu markvirðini.

5.3.2 Alt virksemi skal fara fram soleiðis, at tað ikki hevur við sær ampar av ristingum.
5.3.3 Um ampar verða av ristingum, skulu neyðug tiltøk setast í verk til eitt støði, ið Heilsufrøðiliga starvsstovan kann góðtaka.

## 5.4 Spillvatn

5.4.1 Fyri at avmarka útleiðingina mest møguligt, skal møguligt spill av olju ella øðrum takast upp og burturbeinast, áðrenn undirlagið verður spulað.
5.4.2 Frárenslvatn frá høllini og frá teimum pørtum av økinum uttanum, har ið roknast kann við oljuspilli, skal leiðast gjøgnum góðkendan oljuútskiljara við sandfangi, sum er uttanfyri húsið, og haðani í kommunalu spillvatnsskipanina. Oljuútskiljarin skal tømast eftir tørvi, men í minsta lagi eina ferð um árið.
5.4.3 Oljuútskiljarin skal hava sjálvvirkandi flotlæsara og ávaringarskipan, sum sigur frá, tá hann skal tømast.
5.4.4 Oljuútskiljarin skal hava skipan, ið tryggjar, at emulgerað olja í størst møguligan mun verður hildin aftur, sum t.d. við coalescensfiltri.
5.4.5 Sýnistøkubrunnur, ið ger tað møguligt at taka sýni av spillvatninum, skal vera eftir oljuútskiljaran.
5.4.6 Frárenslvatnið eftir oljuútskiljaran má ikki bera brá av olju ella aðrari dálking. Oljuinnihaldið í spillvatninum eftir oljuútskiljaran má í mesta lagi vera 10 mg/l, kannað sambært DS/R 208.
5.4.7 Ódálkað regnvatn frá taki og økinum uttanum skal leiðast í kommunalu regnvatnsskipanina.
5.4.8 pH í frárenslvatninum frá virkinum skal vera 6,5 – 9,0.
5.4.9 Hitin á spillvatninum til oljuútskiljaran má ongantíð verða meira enn 35° C.
5.4.10 Spillvatn frá vesum skal leiðast í rottanga og haðani í kommunalu spillvatnsskipanina.

## 5.5 Kemikaliugoymsla

5.5.1 Undir goymsluni av kemikalium skal vera kar til at taka ímóti møguligum lekum ella spilli.
5.5.2 Rúmdin á karinum skal vera størri enn rúmdin á tí størsta kemikaliudunkinum.
5.5.3 Goymslan skal vera vard móti vindi og regni.
5.5.4 Goymsla til kemikaliu skal vera læst fyri óviðkomandi.

## 5.6 Burturkast

5.6.1 Alt húsarhalds- og virkisburturkast skal viðgerast sambært galdandi lóggávu. Í løtuni er kunngerð um burturkast galdandi, nr. 147 frá 19. oktober 1995.
5.6.2 Burturkastið skal latast góðkendum móttakara, og tað skal skiljast sundur sambært ásetingum frá móttakara.

### 5.7 Óhapp

5.7.1 Henda óhapp, sum hava dálking við sær, skulu beinanvegin setast í verk tiltøk, so sum upprudding, avmarking og fyribyrging, til eitt støði, sum Heilsufrøðiliga starvsstovan kann góðtaka. Boðast skal frá til umhvørvisdeildina á Heilsufrøðiligu starvsstovuni beinanvegin.

### 5.8 Innaneftirlit

5.8.1 Kanningar sambært góðkenningartreytunum kunna verða umbidnar av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.
5.8.2 Øll sýnistøka og meting av úrslitum verður goldin av virkinum.
5.8.3 Øll sýnistøka skal gerast av felag, sum er góðkent av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.
5.8.4 Øll sýnistøka skal gerast, meðan framleiðslan er í fullari gongd.
5.8.5 Víðkað kanningarskrá kann í serligum føri verða umbiðin av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

### 5.9 Rakstrarskráseting

5.9.1 Nøgdir av allari brúktari olju, smyrjiolju og hjálparevnum skulu skrásetast í rakstrarbók.
5.9.2 Tíðarskráseting fyri, nær oljuskiljari er kannaður og tømdur.
5.9.3 Úrslit av kanning av oljufýri, kanningar av spillvatni skulu førast í rakstrarbók.
5.9.4 Avhendaðar nøgdir av vandamiklum burturkasti, herundir spillolju, skulu førast inn í rakstrarbók.
5.9.5 Rakstrarbókin skal vera á staðnum, og eftirlitsmyndugleikin skal kunna síggja hana eftir umbøn. Bókin skal goymast í 5 ár.
5.9.6 Uppgerð av rakstrarskrásetingunum skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuna í seinasta lagi 1. februar í avloysandi árinum.

## 6. Alment

- Virkið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið nertir við dálkingarviðurskifti virkisins, fyrr enn nýggj góðkenning er givin til hesa víðkan ella broyting.
- Eigaraskifti, navnabroyting eller avtøka skal fráboðast Heilsufrøðiligu starvsstovuni.
- Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur eftirlitið við virkinum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.
- Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóg.
- Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin kann bert verða givið boð ella forboð, um so er at:
  1) nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingar-/skaðaárin.
  2) dálkingin elvir til umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin, ella
  3) dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.
- Tá ið meira enn 5 ár eru gingin eftir góðkenningina, kann Heilsufrøðiliga starvsstovan broyta treytirnar í hesi, tá ið tað er umhvørvisliga grundað, ella um betri reinsingarhættir ella minni dálkandi framleiðsluhættir eru komnir fram.

## 7. Kæruvegleiðing

Hendan avgerð kann sambært grein 66 í løgtingslóg nr. 134 um umhvørvisvernd frá 29. oktober 1988 kærast til Føroya landsstýri. Kæran skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, sum síðan sendir kæruna til Føroya landsstýri við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Vinarliga

Bárður Enni, stjóri

/

Jacob Pauli Joensen, deildarleiðari

**Avrit:** Arbeiðseftirlitið, Postrúm 1134, FO-100 Tórshavn
Føroya landsstýri, Vinnumálastýrið, Postrúm 377, FO-100 Tórshavn
Føroya landfúti, Postrúm 3018, FO-110 Tórshavn
Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postrúm 9, FO-110 Tórshavn
Náttúrufriðingarnevndin fyri Streymoyar sýslu, FO-350 Vestmanna.